# 46 ára gamal tikið skipsføraraprógv

**Tað var ikki lætt hjá Fríðriki Sivertsen at fara á skiparaskúla við bara 9. floksprógvi frá 1980. Men lívsins skúli er góð barlast, og í morgun tók Fríðrikur prógv sum skipsførari**

Randi Jacobsen

Fríðrikur Sivertsen av Viðareiði var bara 16 ára gamal, tá i hann fór úr skúlanum. Hann tók 9. floks og fór so til skips. Tað var í 1980.

Sama ár stóð hann dugnasakpsroyndina á kvøldskúlanum.

Tvey ár hevur hannn hesi árini arbeitt á landi, men øll árini hevur hann siglt. Síðan 1992 hevur hann verið við Fiskakletti, stýrimaður síðan 1997.

### Setti sær mál

Fyri trimum árum síðan fann hann uppá at fara upp á skúla.

– Í fyrstani var tað nokkso tungt, ti eg hevði ikki gingið í skúla í so nógv ár. Men eg kom skjótt í gongd, tí eg hevði sett mær eitt mál. Lívsins skúli er góð barlast, sigur Fríðrik Sivertsen, sum nú býr í Havn.

Fyrst gjørdist hann skipari, og nú skipsførari.

Hann sigur, at hon hevur fingið góð úrslit til próvtøkuna nú. Teir vóru 17, sum í dag hava verið uppi í navigasjón. Teir kastaðu lut um raðfylgjuna, nær teir skuldu upp til roynd, og lutakastið sendi Fríðrik fyrst til.

Hann kom út aftur við einum 10-tali.

– Nú fari eg at leita mær eftir arbeiði. Eg fari at royna frálandavinnuna, tí har er lættast at fáa starv við míni bakgrund, og tann vinnan søkir eisini eftir fólki, sigur Fríðrik Sivertsen.

Fríggjadagin fáa nýggju skipararnir or skipsførararnir prógv síni handað á Vinnuháskúlanum.



*Fríðrik Sivertsen fer sum nýklaktur skipsførari at leita eftir arbeiði í frálandavinnuni*

Mynd: Jens Kristian Vang

---

# Lambskjøtið verður nógv dýrari

**Illveður í Ný Sælandi í ár hevur havt við sær, at lambskjøtið hækkar eini 15 krónur fyri kilo**

Randi Jacobsen

Tað hevur verið bíligari at keypt lambskjøt úr eitt nú Ný Sælandi ogður Falkalndsoyggjunum enn úr Íslandi men næsta úr flýgur kiloprísurin av lambskjøti úr teimum olondunum uppeftir.

Lambskjøtið úr Ný Sælandi verður dýrari, tí veturin har hevur verið vánaligur, og mett verur, at 2,8 mió. nýlembd lomb doyði.

– Tað er so nógv, at tað svarar til alla nýtsluna av lambskjøti í Føroyum í 35 ár, sigur Jørgen Jørgensen, slaktari í Mikladali.

Enn er prísurin ikki hækkaður, men tá ið nýggj vøra kemur í februar, hækkar kiloprísurin væntandi við 15 krónum fyri kilo.

Av tí at minni lambskjøt verður á marknaðinum, fer lambskjøti úr Flakslandsoyggjunum eisini einar 15 krónur upp fyri kilo.

Øskurokið í fjør hevur haraftrat ávirkað útflutningin av lambskjøti úr Íslandi, og av tí sama dýrkaði tað lambskjøtið eisini.



*Jørgen Jørgensen sigur, at prísirnir á innflutta lambskjøtinum fara upp, tí ið nýggj vøra aftur kemur til landið*

Mynd: Jens Kristian Vang

---

# Politiið koyrir út frá Klaksvík

**Frá í dag arbeiðir politiið í Norðurøkinum hvørja viku út á Klaksvík. Sýslumaðurin í Eysturoynni situr mestsum einsamallur á støðini í Runavík**

Randi Jacobsen

Seinastu árini hevur mistnøgd verið millum politistarnir í Norðurøkinum, tí teir aðru hvørja viku hava koyrt út frá Runavík g aðru hvørja viku út frá Klaksvík.

Nú er aftur ein broyting gjørd.

Tá ið politistarnir í Runavík komu til arbeiðs í morgun, fóru teir beint í bilarnar og koyru til Klaksvík. Politistøðin í Klaksvík verður nú teirra arbeiðspláss burturav.

Politistarnir vóru ikki komnir fram til Klaksvíkar í morgun, tá ið boð komu inn um herverk í Søldarfirði. Málið varð sent til politiið í Klaksvík.

Heverk varð framt í gamla skúlanum í Søldarfirði, sum Handilsskúlin á Kambsdali leigar. Har verður javnan framt herverk, sigurIngibjørn Eldevig, sýslumaður í Eysturoynni.